DAGSINS MEINING

Valið útskrivað og hvat so!

Í gjár lat løgmaður av startskotið til løgtingsvalið. Eitt tað mest spennandi valið í føroyskari søgu vil onkur halda, tó at tað ikki eru so nógvir samgongumøguleikar eftir valið kortini. Og tað er jú tað eitt slíkt val snýr seg um. Veljarakanningarnar, sum altið skulu takast við fyrivarni, benda allar á, at verandi samgonga hevur spælt falitt og væl tað. Spurningurin er so, hvør tekur við valdinum í Føroyum.

Tjóðveldisflokkurin við nýggja formanninum megnaði at seta dagskránna eftir seinasta val og hevur hann eisini megnað at dominera orðaskiftið øll hesi árini. Alt samfelagið er vorðið gjøgnumsúrgað av hesum eina málinum, fullveldinum. Uppá gott og ilt. Fólkaflokkurin, ið frá byrjan valdi at lurta eftir nýggju leiðslu Tjóðveldisfloksins, tó at hann eisini slapp at seta síni fingramerki á fullveldistilgongdina, verður nú revsaður og stendur til at fáa eitt katastrofuval. Neyvan góður musikkur í oyrunum á løgmanni, sum framvegis er best umtøkta løgmansevnið. Men allar súðir eru ikki syftar. Løgmaður situr enn við trumfinum, sum er sjálvt løgmansembætið. Hann skal hava meiriluta ímóti sær fyri at fara frá. Eydnast tað ikki Javnaðarflokki og Sambandi at fáa meirilutan kann løgmaður bjóða smærri flokkunum góðar sessir í Tinganesi og halda fram sum minnilutastjórn. Tjóðveldið fer neyvan at fella slíka stjórn, um alternativið er at fáa samríkjaflokkarnar úti í Nesið. Hetta er trumfurin hjá løgmanni.

Tjóðveldisflokkurin, ið hevur megnað at styrkt støðu sína eftir fýra ár í landsins stýri, kann koma at standa einsamallur eftir valið. Hóast framgongd ber eisini til at siga, at flokkurin, nú hann hevur sett alt uppá eitt brett, hevur ikki møtt ta vælvild frá veljaranunum, ið hann hevði roknað við. Stórt spurnartekin kann setast við, um nýggja leiðslan hevur verið nóg búgvin, tá hon hevur kappað á stokkinum við gomlu veteranararnar, sum nú forláta skútuna. Onkur vil siga verða trýstir at fara av skútuni. So kann man velja at trúgva tí man vil. Men ikki skerst burt, at flokkurin við nýggju leiðsluni hevur minkað munandi um møguleikarnar at vera við í landsins leiðslu. Onkur vil siga, at tað er spell, tí í flokkinum hava verið mong skilafólk, sum hóast ræsttrúgvandi kortini hava dugað sær høgv og virt demokratiska siðin um samstarv við aðrar. Tjóðveldisflokkurin tilførdi almenna tjakinum nakað nýtt og skilagott, tá hann miðvíst fór undir at gera meira burtur úr sjálvstýrismálinum. Men hetta verður ikki gjørt við snartoksferð, tí tað hvørki tolir samfelagið ella fæst undirtøka fyri. Ein høvlig men miðvís gongd móti størri sjálvstýri og sjálvbjargni er rætta leiðin. Men hon skal ikki bara vera uppá premissini hja einum flokki.

Valið komadi snýr seg um so nógv. Eisini umræddu sjálvtýristilgongd. Tað er skilagott um flokkarnir við teimum mest viðgongdu sjónarmiðjunum bæði hvat viðvíkur rikisrættarligu viðurskiftunum og búskaparligu og sosialu spurningunum læra av royndunum seinastu árini og leggja seg nærri miðjuni. Landsstýrið komandi fer helst at reka ein miðpolitikk. Skulu Sambandið øðrumegin og Tjóðveldið hinumegin hava nakran tjans at vera við, mugu hesir flokkar nærkast miðjuni og sleppa nøkur av sínum gomlu og víðgongdu sjónarmiðjum. Alt eftir hvør megnar tað best verður avgerandi fyri, hvør myndar landsins leiðslu komandi árini. Teir flokkar, ið longu hava víst seg sum hóvligar og semjusøkjandi kunnu koma at avgera samansetingina av komandi landsstýri.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Aftursvar til huldumann

Heðin Mortensen
ÍSF forseti

Síggi í Dimmalætting fríggjadagin, at ein sjálvstýrismaður, sum ikki torir at seta sítt kristna navn í blaðið (men hetta er teimum so líkt), við ósannindum leggur meg undir at hava gingið í skrúðgongu undir Dannebrog. - Hetta avsanni eg harðliga.

Hesin huldumaður vísir til eina grein hjá mær í bløðunum herfyri í samband við OL-viðurkenning, har eg m.a. sigi, at sum sjálvstøðug ítróttartjóð luttaka vit bara sum føroyingar.

Hesi orð havi eg ikki bara sagt, men eisini víst í verki øll árini sum forseti í ÍSF.

Annars rokni eg við, at allir føroyingar uttan politiskan lit, við gleði hava sæð okkara ítróttafólk luttikið runt um í heiminum í ymsum ítróttakappingum, Oyggjaleikum og Paralympic - allastaðni við Merkinum á odda - og havi eg tá mangan gingið erpin við í skrúðgonguni, sum huldumaðurin tekur til.

So ósannindi hansara mugu standa fyri hansara egnu rokning.

Vitjið mína heimasíðu

Elin Lindenskov

Mín heimasíða er nú klár at vitja. Har har kanst tú síggja, hvat eg meini. Eg leggi mína meining um aktuel evni út á heimasíðuna dagliga.

Á heimasíðuni eru so gott sum allar mínar greinar og røður langt aftur í tíðina. Eg havi eisini roynt at savnað saman blaðgreinar, sum viðgera mál, sum eg havi verið við í. Hetta gevur tær eina góða mynd av, hvat eg standi fyri og havi verið við til at gjørt.

Sjálvandi leggi eg eisini valgreinarnar til hetta valið út á síðuna. Og tú kanst síggja valgreinarnar, eg havi skrivað til onnur val, har eg havi verið uppstillað. Á henda hátt kanst tú síggja um eg haldi orð, ella um eg kanska havi skift meining í onkrum førum.

Tú kanst spyrja meg um eitthvørt, ella bara siga tína meining. Eg royni at svara tær, so skjótt eg kann.

Eg havi eisini annað tilfar á síðuni, sum einki hevur við valið at gera. Hetta eru evni, sum eg havi áhuga fyri. Eg eri í ferð við at leggja mínar myndir á síðuna. Tú kanst lesa um plantuliting, sápufremleiðslu og kertuljós. Á síðuni eru eisini slóðir til aðrar heimasíður, sum hava mín áhuga.

Eg eri eitt sindur stolt av síðuni. Tí eg havi sjálv gjørt hana. Eg havi ikki ráð til at gjalda øðrum fyri at gera hana, so eg havi seinastu árini lært meg at brúka myndaforrit og heimasíðuforrit, umframt at eg eisini taki myndir. Mín heimasíða er á www.lindenskov.com.

Hvaðani kemur flogið

Jónas Johnsson

- Mest royndi flokkur í føroyskum politikki er Sjálvstýrisflokkurin, sum er tann einasti, ið hevur sín beinleiðis uppruna í tjóðskaparrørsluni.

- Sjálvstýrismenn eru nú í øllum flokkum við ymiskum hugsjónum. Felags ynskið er, at Føroyar skulu klára seg. Og viljin at standa á egnum beinum er ikki nøkur ódygd.

- Í hugsjón sambandsmanna tykist innasti kjarnin vera svartskygnið, at Føroyar klára seg ikki. Teir vilja halda seg til Danmarkar fyri at njóta av ríkiskassanum. Men aldargamla skipanin er ikki heil, tí føroyingar rinda ikki ríkisskatt. Tað ynskir afturhaldið heldur ikki. Teir vita, at um skattskylda til ríkiskassan verður løgd á okkum, hvørvur flokkurin líka skjótt, sum hann varð til í 1906.

- Lukkutíð glógvar í onkrum. Magni Laksafoss eftirlýsir í besta sjálvbjargnisanda eini heildarætlan fyri sjálvberandi føroyskum búskapi, fyri at fáa blokkin burtur (Dimmalætting 16/3). Men flest onnur valevnir sambandsins skriva beint øvugt, og eru fullkomiliga botnað av øllum tí, ið fingist kundi fyri 366 danskar milliónir. Magni er tí ein stakur fuglur.

- Í samleika eru annars eingir munur á sambands- og sjálvstýrisveljarum. Tað er bert ein stigmunur í varsemi. Fjákuta nálganin í øllum tí, sum danskt er, er horvin. Sambandsmenn eru skjótir at gerast sjálvstýrismenn, eru teir sannførdir um, at tað ber til. Uttan figgjarligt frælsi er heldur einki veruligt frælsi.

- Við støkum veingi kann fuglur bert taka til beinini. At tvinna veingir, og geva teimum flog, hevur Sjálvstýrisflokkurin prógvað ár eftir ár.

- Meðalferðin til fult sjálvstýri má sigast at have verið hóvlig. Vit skulu minnast til hvussu føroysk samfelagsviðurskiftir áður vóru fyri, og at vit í nøkrum teirra enn sigla aftanfyri grannarnar. Men vit taka okkum framm í stórum tøkum. Menningin ger, at afturhaldið náttúrliga fer at holast út.

- Framtíðin er spennandi. Vónandi taka fleiri við snotuligum veingjum.

- Minnist smáfuglarnar.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Bannið av handilslýsingum í SvF og ÚF hevur fatalar avleiðingar

Sissal Kj. Kristiansen
henna_gaijin@hotmail.com

1. mars 2002 legði Lisbeth L. Petersen fram uppskot í tinginum um at nokta Sjónvarpi Føroya og Útvarpi Føroya at senda handilslýsingar. Lisbeth vil vera við, at við at broyta lógina soleiðis at SvF og ÚF ikki fáa loyvi at senda handilslýsingar betra vit um trúvirði hjá almennu stovnunum, og at vit somuleiðis avtaka monopolið, ið almennu fjølmiðlarnir í dag hava á økinum. Í Degi og Viku hóskvøldið 21. februar, var sama hugskot á lofti, og her bygdu argumentini uppá, at almennu stovnarnir fingu pening frá landinum, meðan kappingarneytarnir (rás 2 og Lindin) ikki fáa henda pening og tí skula teir fáa loyvi at ogna sær peningin, ið fæst við handilslýsingum.

Tað, ið eg síggi sum stórsta vansan við uppskotinum er tó, at við at nokta Sjónvarpi Føroya at senda handilslýsingar, so noktar meðan hesar somu lýsingar ikki hava verið nóg effektfullar, og fyritøkan, ið hevur keypt lýsingarnar, er farin av knórarnum. Nú veit eg ikki, um tann veruligi boðskapurin við greinastubbanum hjá Georg var at siga, at vit heldur skula droppa alt um at gera lýsingar í Føroyum, eftirsum eingin hevur ráð til at gera tær ordiliga alíkavæl. Hvussu er og ikki, so verða lýsingarstovurnar ikki betur førar fyri at gera góðar lýsingar, fáa tær ikki neyðugu royndirnar. At stoðið á føroysktgjørdum sjónvarpslýsingum er hækkað munandi, síðan tær í fyrstani komu á føroyska gluggan, kann heldur eingin ivi vera um. Føroyskar fyritøkur eru farnar at síggja virði í at gera ordiligar lýsingar, tær er blivnar væl meira sjónligar og nógvar kunna nú samanbera seg við útlendskar fyritøkur, tá talan er um marknaðarføring. Soleiðis hava eisini føroysku lýsingarstovurnar fingið møguleikan at vísa, hvat tær í veruleikanum duga, og tað er ikki heilt lítið.

Tað eru ymsir mátar at hyggja eftir vansanum við uppskotinum uppá.

Nýggjar fyritøkur í Føroyum eru ofta í kapping við fyritøkur, ið eru sera sterkar á føroyska marknaðinum. Gamlar fyritøkur í Føroyum hava eitt goodwill einans tí tær hava verið einsamallar á marknaðinum so leingi. Føroyingurin er ofta sera vanabundin og kenningar-trúgvur, og hetta ger, at hann/hon ikki roynir nýggjan útbjóðara beint sum hesin kemur fram. Man er skeptiskur mótvegis nýggjum fyritøkum, men serliga er tað tí man er trúgvur mótvegis gomlum fyritøkum. Tann nýggja fyritøkan hevur tó við lýsingum í sjónvarpi, útvarpi og bløðunum møguleika at vísa seg og gera føroyingin tilvitaðan um, at tað finnast aðrar fyritøkur enn tær (góðu?) gomlu. Við lýsingunum kann nýggja fyritøkan fáa vanabundna brúkaran í talu.

Eitt sera gott dømi um effektina av sjónvarpslýsingum, er fyritøkan "Hjá Fróða". Bløðini hava skriva um fyritøkuna, ið byrjaði við einum fallittbúgvi og í dag er millum best seljandi málingahandlarnar í Føroyum. At Fróði við viti, skili og kanska eitt sindur av heldi hevur fingið fótafesti á marknaðinum, er eingin ivi í. Hinvegin er "Hjá Fróða" eisini eitt gott dømi um, hvussu man fótar sær á føroyska marknaðinum. Lýsingarnar hjá Fróða, gjørdar av føroyskum lýsingarstovum, sendar í SvF, hava havt stóran týdning fyri framgongdina hjá Fróða. Tað hevur serliga verið gjøgnum SvF, at føroyski brúkarin er blivin tilvitaður um Fróða, og við tíðini hevur fyritøkan fingið pláss í hugaheiminum hjá føroyska brúkaranum. "Hjá Fróða" er gott dømi um nýggja ættarliðið av føroyskum vinnu-lívsfólkum. Um Lisbeth fær ynski sítt ígjøgnum fer tað at ganga út yvir slíkar nýggjar fyritøkur. Hjá fyritøkum ið e.n. hava fyrimyndir uttanfyri føroyska landamarkið, lat meg kalla tær nútíðarhugsandi fyritøkur, og sum fegnar ynskja at røkka unga ættarliðið av føroyskum brúkarum er sjónvarpslýsingin gongda leiðin. Generatión MTV, sum nøkur plaga at kalla tey, kenna fyritøkuna á lýsingum og kanska serstakliga sjónvarpslýsingum. Tá málbólkurin er hesin bólkur, er sjónvarpslýsingin tí best gongda leið. Úm SvF ikki skal kunna senda hesar lýsingar, hvør er so miðilin hjá hesum at røkka málbólkin?

Sum tað skilst, havi eg sera ilt við at skilja, hvussu floksformaðurin hjá Sambandsflokkinum kann leggja eitt so ógjøgnumhugsað uppskot fram. Tað kann væl vera, at politikararnir síggja handilslýsingarnar sum orsøkina til, at almennu miðlarnir enn hava tað monopol teir hava. Men við at nokta føroyskum fyritøkum og lýsingarstovum at senda boðskapin/lýsingar gjøgnum tær kanalir, ið geva úrslit drepa politikararnir nakrar føroyskar fyritøkur og styrkja monopolið hjá øðrum føroyskum fyritøkum. Avleiðingarnar av uppskotinum hjá Lisbeth eru at vit enda aftur í fortíðini, tá man keypti frá handilsmanninum, sum foreldrini keyptu frá líkamikið um prísur og góðska ikki samsvaraðu. Vit drepa lýsingarstovurnar og vit økja um kenningamonopolið, ið hevur merkt føroyska vinnulívið leingi nokk.

Um lesarin nú hugsar, "møguleiki er enn fyri at lýsa í bløðunum, Lindini ella á Rás 2", má eg minna hann á, at tað er viðastóru munur á nær og hvussu miðlarnir vera nýttir. Tað er sera sláldan at ein útvarpslýsing (gjørd av lýsingarstovu) er ætlað at virka einsamøll. Ofta hongur útvarpslýsingin saman við sjónvarpslýsing. Tað merkir, at útvarpslýsingin kann ikki kompensera fyri sjónvarpslýsingina.

Í roynd og veru verður talufrælsi tikið frá føroyskum fyritøkum við lógaruppskotinum. Fyritøkur, ið ynskja at lýsa í sjónvarpi, missa henda møguleikan at senda teirra boðskap út. Og so spyrji eg, er tað við vit vilja í Føroyum?

Útbúgving hjá ungum føroyingum

Finnleif Guttesen
Valevni hjá sambandsflokkinum í Suðuroy
fg800@post.olivant.fo

Verða útbúgvingarmøguleikarnir hjá ungum føroyingum betri uttanfyri ríkisfelagsskapin, svari er eitt greitt nei.

Allir føroyingar skulu hava møguleika fyri útbúgving og tað hava vit ídag, við atgongd til hægri danskar lærustovnar og skúlar av øllum slagi, ókeypis, við SU lestrarstuðli og møguleikan fyri at taka lestrarlán.

Føroyingar, sum taka eina útbúgving í Føroyum ídag eru verri fyri, tí teir fáa ikki sama stuðul, sum teir kundu fingið við at taka útbúgvingina í Danmark.

Er tað hetta ung og onnur lesandi ynskja, nú tey skulu søkja inn á skúlar uttanfyri Føroyar?

Uttanfyri norðurlond
Við at taka eina útbúgving í Onglandi, skalt tú til dømis gjalda 100.000 krónur fyri skúlagongdina. Úr føroyum fært tú 60.000 krónur til skúlagjald, meðan tú fært 4231 krónur um mánaðin frá SU úr Danmark, ikki úr Føroyum.
Tað sum manglar í til skúlagongd, íbúð, mat og skúlatilfar mást tú taka í láni ella arbeiða fyri.

Sambandsflokkurin sigur, at tey lesandi eiga at fáa ein útbúgvingarstuðul, sum tryggjar øllum figgjarligar møguleikar fyri at fáa eina útbúgving. Tey sum taka eina útbúgving uttanfyri ríkisfelagsskapin eiga tí at fáa ein hægri stuðul enn ídag, til at gjalda skúlagongdina við.

Onnur norðurlond
Loysingarflokkarnir siga, at føroyingar skulu hava sama útbúgvingarstuðul sum hini norðurlondini, og ljóðar hetta kanska gott í oyrunum hjá nógvum ungum, men verðuleikin er, at skipanirnar í hinum norðurlondum er ikki á sama støði sum skipanin í ríkisfelagskapinum, har stuðulin er 4231,- krónur um mánaðin frá SU, tí:
Í Svoríki er stuðulin 572 krónur um vikuna undir 25 ár og 1364 kr um vikuna tá ið tú ert yvir 25 ár.
Í Finlandi er stuðulin 1270-1540 markar um mánaðin.

Frælsi til útbúgving
Vilja ung lesandi hava líka góðar og helst betri lestrarmøguleikar enn í dag, so er sambandsflokkurin besta trygdin fyri hesum, tí sambandsflokkurin vil geva verandi og komandi ættarliðum frælsi til at útbúgva seg, av fríðum vilja og ikki av figgjarligum áðum.

Nakað um kongsjørðina

Jón Joensen
bóndi í Bø

Í Dimmalætting 31. januar 2002 hevði Bjørn á Heygum grein hann nevndi: "Skulu bøndirnir taka ábygd av egnum landi?".

So skilagóður og viðkomandi málburður um viðurskiftini innan kongsjørðina er sjáldsamur at síggja á prenti. Ja so sjáldsamur, at eg og kanska fleiri hava skeitt í bløðini hendan góða mánaðan, síðan hendan grein varð at síggja. Tí vænta vørð, at ragnarrok fór at dynja yvir tann penn, ið so greitt tordi at lýsa støðuna hjá føroyska kongsbóndanum. Men ikki eitt orð! Eg eri ovfarin. Tøkk skal Bjørn á Heygum hava, fyri orðini hann har lat falla.

Í hesum sama viðfangi fari eg at nevna aðalorðaskifti um jørð, sum var á tingi seinasta ár. Í hesum lítiðsigandi kjaki hómaðust eingi verulig hugskot, sum kundu verið tikin til álvarsliga viðgerð. Meira at siga dugnaloysi í hesum máli innan tingsins høgu gátt.

Ella fimmarin, sum var útvarpaður fyri nakað síðan. Í fleiri førum lá hetta kjaki á so lágum støði, at tað ikki var søguligt, at koma í almennum útvarpi.

Aftursvar frá bóndunum? Nei! Bóndirnir skul halda kjaft! Tí teir hava formyndarar, sum vita og siga bóndum, hvussu teir skulu hugsa, og hvat teir skulu gera!

Uppskot um broytingar í jarðarlógini liggur í tinginum; men har kunnu menn ikki semjast.

Rópt verður um tjóðskaparligt frælsi, uttan at vilja innanhýsis frælsi, so haðani er lítið at vænta í framtíðini.